

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 02 - 2012

# OPEC - Minni eftirspurningur í 2012

Felagsskapurin hjá oljuútflytaralonfunum, OPEC, hevur nú broytt sínar upprunaligu metingar fyri árið í ár. Í teirri mánaðarligu frágreiðingini, sum felagsskapurin almannakunngjørdi í gjár, verður roknað við minni eftirspurningi eftir olju í 2012 enn upprunaliga mett. OPEC roknar við, at eftirspurningurin fer at liggja um 88,76 milliónir tunnur um dagin í ár. Tað er 940.000 tunnur meiri enn í 2011, men kortini 120.000 tunnur minni enn í síðsta mánað. Í januar framleiddu OPEC-londini 30,9 milliónir tunnur um dagin, og tað er tað mesta síðani oktober í 2008. Samlaða dagliga útboðið á marknaðinum í januar var 88,87 milliónir tunnur, og tað var 460.000 tunnur meiri enn í desember. Her kann nevnast, at tann dagliga framleiðslan hjá OPEC-londunum var 56.000 tunnur størri í januar enn í desember. OPEC væntar, at búskaparvøksturin í heiminum verður 3,4 prosent í ár og ikki 3,5 prosent, sum felagsskapurin metti fyri einum mánað síðani. Hinvegin heldur felagsskapurin fast um, at vøksturin í 2013 verður 3,6 prosent. Vøksturin í amerikanska búskapinum er mettur til 2,2 prosent í ár, og OPEC væntar, at vøksturin í Kina og India verður ávikavist 8,2 og 7,2 prosent. Tað er heldur minni enn tann upprunaliga metingin.